**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
**MINISTRY OF FINANCE**

| **FMR-Rundskriv** | 18. desember 2017 |
|---|---|
| **Til: Stjórnarráðini og stovnar undir landinum** | **FMR j.nr. 17/00020** |
| **Rundskriv um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum** | |

**1.0. Endamál**
Við hesum verða mannagongdir lýstar um hvussu lønir skulu tíðaravmarkast í landsroknskapinum.

**2.0. Løggildi**
Við heimild í § 3 í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m. verður ásett, hvussu lønir verða tiknar við í roknskapin um ársskiftið.

**3.0. Mannagongdir**
Meginreglan í § 13 í kunngerð um roknskaparverk landsins o. t. er latingarmeginreglan, sum merkir, at ein útreiðsla skal verða skrásett, tá ið vøran ella veitingin verður framd. Sambært § 13, stk. 1, skulu lønarútreiðslur tí sum meginregla verða tiknar við í tí roknskaparári, rætturin til lønina verður innvunnin.

Av tí at fleiri lønarskyldur ikki koma til útgjaldingar fyrr enn í árinum eftir, skulu stovnarnir tíðaravmarka lønir við ársskiftið sambært talvuni í skjali 1, har greitt er frá, hvørjir postar skulu verða tíðaravmarkaðir og ikki.

Meginreglan er, at tímasaldur skulu tíðaravmarkast, tá ið starvsfólkið eigur fleiri enn 40 tímar ella skyldar fleiri enn 30 tímar. Uppspardar serstakar frívikur skulu tíðaravmarkast sum partur av tímasalduni.

Lønir, sum standast av vaktum og ikki avgreiddum sáttmálabroytingum, verða sum meginregla altíð tíðaravmarkaðar. Tað sama er galdandi fyri uppsagnarløn, tá ið starvsfólk verður fríttstillað í uppsagnartíðini.

**4.0. Gildiskoma**
Hetta rundskriv kemur í gildi 18. desember 2017. Samstundis fer úr gildi rundskriv nr. 9001 frá 16. januar 2017 um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

**5.0. Skiftisreglur**
*Roknskaparligar avleiðingar av meginreglubroyting*
Stovnar, sum higartil hava tíðaravmarkað lønir eftir øðrum meginreglum enn eftir latingarmeginregluni, t.d. eftir kontantmeginregluni, fáa sannlíkt eina meirútreiðslu orsaka av broytingini.

Er meirútreiðslan lutfalsliga stór kann stovnur gera avtalu við Føroya gjaldstovu um, at meirútreiðslan verður javnað yvir fleiri roknskaparár, tó ikki longur enn roknskaparárið 2019.

*Roknskaparligar avleiðingar fyri tíðaravmarkan av lønum, sum standast av vaktum*
Fyri tíðaravmarkan av lønum, sum standast av vaktum, er sannlíkt, at stovnar fáa eina tøkniliga meirútreiðslu orsaka av meginreglubroytingini.

Henda tøkniliga treytaða meirútreiðslan skal ikki takast við í raksturin. Í staðin skulu roknskaparpostarnir fyrst í tí fíggjarárinum, tá ið broytingin verður gjørd, verða tillagaðir soleiðis, at teir vísa ta upphædd, sum teir høvdu havt, um so var, at broytingin varð gjørd frammanundan fíggjarárinum.

Henda javningin fer fram eftir § 14 í kunngerð um roknskaparverk landsins o. t. og skal fremjast ikki seinni enn roknskaparárið 2017.

Fíggjarmálaráðið, 18. desember 2017

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

# Talva við yvirliti yvir tíðaravmarkingar av lønum Skjal 1

| Evni | Partsevni | Tíðarav-marking | Avgerðargrundarlag | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| 1. Frítíð | 1.1 Frítíðarløn 12% | Ja | | Er longu tíðaravmarkað, tí frítíðarløn verður goldin út í grunn saman við lønini |
| | 1.2 Løn í frítíðini, fastlønt | Nei | | Forskjótingarnar eru so smáar ár undan ári, at meirarbeiði og feilmøguleikar svara ikki til meirinfo. |
| | 1.3 Serstøk frívika | Ja/Nei | Hevur lønmóttakari biðið um at fáa fríviku flutta at halda í seinni frítíðarári, skal hon tíðaravmarkast. Tó eru somu mørk galdandi, sum í 2.1. | Verður frívikan hildin ella útgoldin í fyrsta frítíðarárinum, hon kann verða hildin ella útgoldin, verður tað roknað sum løn í frítíð. |
| | 1.4 Frítíðarískoyti | Nei | | Do 1.2 |
| 2. Tímar o.tíl. | 2.1 Tímar | Ja | Eigur starvsfólkið fleiri enn 40 tímar ella skyldar fleiri enn 30 tímar, skulu tímarnir verða tíðaravmarkaðir. Talan skal vera um tímar, sum starvsfólkið hevur rætt til at fáa útgoldnar ella at avspáka. | Tímarnir kunnu vera salda í klokkuskipan, vaktætlan ella tímar, sum stovnurin hevur skrásett á annan hátt. |
| | 2.2 Yvirtíð | Ja | Somu mørk, sum í 2.1. Talan skal vera um álagda úrtíð, t.e. tímar, sum ivi ikki er um, at starvsfólkið hevur rætt til at fáa útgoldnar ella at avspáka. | Einstaka starvsfólkið kann tilsamans ikki eiga fleiri enn 40 tímar á. |
| 3. Vaktir | 3.1 Tímar, gjald fyri ólagaliga arbeiðstíð o.tíl. | Ja | Lønir, sum standast av vaktum, verða tíðaravmarkaðar. Tímar, sum ikki verða avroknaðir innan síðsta ískoytisskeið, verða viðgjørdir sum ásett í 2.1. | Umvegis Vaktætlanarskipanina verður partur av tí, sum er innvunnið í desember, útgoldið í januar. Tað verður tíðaravmarkað og sjálvvirkandi bókað saman við lønini fram til 20. februar. Tímar frá undanfarna ári, sum ikki eru avroknaðir 20. februar, verða tíðaravmarkaðir sambært uppgerð úr Vaktætlanarskipanini. |
| 4. Væntaðar sáttmálabroytingar | | Ja | | Javningin verður gjørd grundað á miðal lønarvøksturin í teimum sáttmálum, sum semja er gjørd um. Føroya gjaldstova skrásetur javningina í landsroknskapinum. |
| 5. Uppsagnarløn | 5.1 Starvsfólk fríttstillað í uppsagnartíðini | Ja | Meginreglan er, at skyldan verður tíðaravmarkað til, tá ið hon er komin í, líka mikið nær goldið verður út. | Tá ið talan er um starvsfólk, sum verður fríttstillað (t.e. eingin mótveiting í uppsagnartíðini), verður útreiðslan tíðaravmarkað á uppsagnarárið |
| | 5.2 Starvsfólk arbeiðir í uppsagnartíðini | Nei | | Arbeiðir starvsfólkið í uppsagnartíðini (t.e. mótveiting er í uppsagnartíðini), verður útreiðslan ikki tíðaravmarkað. |
| 6. Tænastumanna-eftirlønir | Eftirlønarskylda | Nei | Skyldan verður ikki tíðaravmarkað, men verður tikin við í roknskapin, tá ið hon verður goldin út. | |
| 7. Forútløntar lønir | | Nei | Skyldan verður ikki tíðaravmarkað, men verður tikin við í roknskapin, tá ið hon verður goldin út. | Forskjótingarnar eru so smáar ár undan ári, at meirarbeiði og feilmøguleikar svara ikki til meirinfo. |